# Helena vil hække pensjónirnar

**Helena Dam á Neystabø vil hava 28 milliónir krónur meira til pensjónir næsta ár, so tey eldru í samfelagnum eisini kenna búskaparligu framgongdina í samfelagnum**



PENSJÓNIR
*Eyðun Klakstein*

Helena Dam á Neystabø hevur lagt broytingaruppskot til fíggjarlógina fyri tingið. Tingkvinnan, sum ikki longur er partur av nøkrum flokki, vil hava 28 milliónir krónur meira settar av til pensjónir.

– Tað er framvegis alt ov stórur munur á, hvørjar umstøður fólk hava á ellisárum sínum. Og tað er heilt greitt, at fólkapensjónistar, sum bara hava sína fólkapensjón at liva av, hava krav upp á eina hækking av inntøkuni, sigur Helena Dam á Neystabø í viðmerkingunum til uppskotið.

*Helena Dam á Neystabø heldur, at tað er skyldan hjá løgtinginum at tryggja pensjónistunum hægri inntøku, nú øll onnur í samfelagnum merkja búskaparligu framgongdina*

Hon heldur, at tað eru eingin tekin um, at landsstýrið ella meirilutin í fíggjarnevndini ætlar sær at hækka pensjónirnar. Í álitinum um fíggjarlógina hevur meirilutin ikki sett nakað uppskot fram, sum kann tryggja eina hækking av pensjónunum, og einki verður heldur sagt um, at landsstýrið hevur í kvittanum at hækka pensjónirnar næsta ár.

Tí tekur Helena Dam á Neystabø sjálv hetta stigið, so tey eldru kunnu fáa hægri fólkapensjón.

**Merkja onga framgongd**

Helena Dam á Neystbø heldur, at tað er skyldan hjá løgtinginum at tryggja eina hækking í fólkapensjónini, nú allir aðrir føroyingar hava fingið lønarvøkstur. Ella koma tey eldru bara at kenna búskaparframgongdina sum eina stóra byrðu, sigur hon.

Tingkvinnan heldur, at í fyrsta lagi skulu grundupphæddin og viðbøtur hækkast. Harafturat skal munurin millum gift og ógift takast burtur, og eisini skulu pensjónistar hava møguleikan at vinna meira pengar umframt fólkapensjónina. Í dag ber til at forvinna 21.400 krónur, áðrenn pensjónin minkar, men hetta mark skuldi verið einar 50.000 krónur, heldur Helena Dam á Neystabø.

Broytingaruppskotið til fíggjarlógaruppskotið hjá landsstýrinum verður lagt fram í sambandi við 2. viðgerð av fíggjarlógini.

# Barsskor setast í stand

**Gamla strandfaraskipið hevur verið til høvuðssýn, og næstu vikurnar verður Barsskor umvældur á bedingini í Klaksvík**

SAMFERÐSLA
*Eyðun Klakstein*

Strandfaraskipið Barsskor liggur á beding í Klaksvík, og har verður hann liggjandi komandi vikurnar.

Gamla strandfaraskipið hevur verið til høvuðssýn, og hetta sýn staðfesti, at tað er ymiskt, sum skal gerast við skipið.

Strandferðslan hevur seinastu dagarnar bíðað eftir úrslitinum av sýnum hjá Skipaeftirlitinum, og nú tað er komið, hevur Strandferðslan sett gongd á umvælingarnar, so Barsskor taka siglingina uppaftur millum Klaksvík og Kalsoynna.

Tað verður roknað við, at arbeiðið fer at taka nakrar vikur, og tí fer Barsskor ikki aftur í vanliga sigling fyrr enn um ársskiftið.

Seinastu tríggjar vikurnar hevur Súlan røkt siglingina til og úr Kalsoynni, og tað kemur hon framhaldandi at gera restina av árinum.



*Tað fer at taka nakar vikur atseta Barsskor í stand, so hann kann fara í sigling aftur*

# Emma til Klaksvíkar



*M'as Blues Band fer at syngja Babu í Klaksvík í dag*

**Klaksvík:** Fríggjadagin fer M'as Blues Band at spæla í Klaksvík. Hetta fer kendi bólkurin at gera við Statoilstøðina, sum skipar fyri tiltakinum.

Umframt Emmu og hennara fólk fer Karl Martin Samuelsen eisini at syngja jólasangir. Karl Martin hevur júst givið nýggja jólfløgu út saman við Rúnu á Heygum.

Tiltakið verður fríggjadagin klokkan 16.00.

**ek**

# Rás 2 beinleiðis úr Barok

Klaksvík: Fríggjakvøldið fer Rás 2 at senda beinleiðis úr Barok í Klaksvík.

Tað vera teir báðir Gunnar Hansen og Kristian Joensen, sum fara at brúka Barok sum studio fríggjakvøldið. Teir hava sendingina Náttarvaktin, sum er sending við tónleiki, spurnarkapping og øðrum.

Tveir av ídnastu luttakarunum í spurnarkappingunum, sum vanliga eru umvegis telefon, hittast andlit til andlit á Barok hetta kvøldið.

Sendingin byrjar klokkan 22.00 og heldur fram til klokkan 01.00. Tá sendingin er liðug, halda Gunnar og Kristian fram sum plátuvendarar til dansin á Barok.

**ek**

# Søkja eftir fólki til nýggja bústovnin



*Søkt verður eftir starvsfólkum til nýggja bústovnin fyri autistar og menningartarnað, sum letur upp í Klaksvík*

**Nú verður søkt eftir fólkum at manna størvini á nýggja bústovninum og sambýlinum í Klaksvík**

SAMBÝLI
*Eyðun Klakstein*

**Klaksvík:** Tað verða brúk fyri 13 starvsfólkum til Bústovnin og Sambýlið á Mýrivegi í Klaksvík. Hetta er nýggjur stovnur, sum verður tikin í nýtslu eftir ársskiftið.

Stovnurin er bústaður í tveimum eindum. Bústovnurin verður heim hjá fýra dreingjum við autismu, og í sambýlinum skulu seks vaksin menningartarnað fólk búgva.

Søkt verður eftir 10 fólkum til tænastumannastørv og eftir trimum hjálparfólkum. Hetta verður gjørt treytað av góðkenning frá Fíggjarmálastýrinum.

**Útbúgvið fólk**

Uppgávurnar hjá arbeiðsfólkunum á nýggja stovninum verða at taka sær av íbúgvunum og gera annað arbeiðið í heiminum. Í lýsingini eftir fólki verður dentur lagdur á, at umsøkjararnir skulu hava vitan um økið og eru áhugaðir í at útbúgva seg meira.

Bert tey, sum hava námsfrøðisligt prógv ella líknandi útbúgving, kunnu søkja tænastumannastørvini. Um ikki nóg nógv útbúgvið fólk er til hesi størv, verða tey fyribilssett við fólki við øðrum førleika.

Umsóknarfreistin er 20. september, og ætlanin er at manna størvini frá 1. januar næsta ár.



# Fólkaskúlalógin fingið arbeiðsætlan

**Í sambandi við Fólkaskúlalógina frá 1997 er nú gjørd ein arbeiðsætlan. Talan er um eitt álit, sum skal gera tað soleiðis, at tað fer at bera til at útnytta møguleikarnar, sum eru í Fólkaskúlalógini. Allir partar tykjast higartil rættiliga væl nøgdir**



*Elsa Birgitta Petersen og Òli Holm fáa her handað álitið frá formanninum í arbeiðsbólkinum, Heðin M. Klein.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

FÓLKASKÚLIN
*Heri á Rógvi*

Hósmorgunin kundu landsstýrismaðurin í mentamálum og forkvinnan í Føroya lærarafelag fáa hvør sítt avrik einum áliti við heitinum Fólkaskúlalógin – ein avbjóðing.

Hetta er úrslitið av arbeiðinum hjá einum arbeiðsbólki, sum hevur verið í holt við hesa verkætlanina síðani í februar mánað í ár.

Arbeiðsbólkurin er settur sambært einum protokollati millum Føroya lærarafelag og Undirvísingar- og mentamálstýrið, ið var undirskrivað hin 30. apríl 2000.

Hóast arbeiðið skuldi verið gjørt liðugt áðrenn 1. januar 2001, so endaði tað tó við, at álitið varð handað hósmorgun. Formaðurin fyri arbeiðsbólkin, Heðin M. Klein, vildi ikki koma nærri inn á, hví hetta hevði tikið meiri tíð enn upprunaliga ætlað, men hann vísti á, at tann fyrsti fundurin, sum arbeiðsbólkurin hevði havt, varð hildin í februar mánaði í ár. Heðin M. Klein er valdur til formann fyri arbeiðsbólkinum av hinum limunum í bólkinum. Teir seks limirnir, sum umframt Heðin hava sitið í arbeiðsbólkinum, eru: Gyðja Hjalmarsdóttur Didriksen og Súni Kristiansen, bæði fyri Føroya lærarafelag. Durita Tausen, fyri Fíggjarmálastýrið. Jenny Lydersen og Thordis Dahl Hansen, fyri Mentamálastýrið. Arnbjørn Kristiansen hevur umboðað skúlanevndinar og skúlastýrini. Thordis Dahl Hansen hevur verið skrivari.

**Nýtmeting**

Í álitinum verða mong økið viðgjørd, og arbeiðsbólkurin kemur eisini við tilmælum á teimum ymsu økjunum.

– Arbeiðsbólkurin er av teirri sannføring at nú fólkaskúlalógin hevur verið í gildi og er roynd í nøkur ár, eigur landsstýrismaðurin saman við Fólkaskúladeildini í Mentamálastýrinum at gera eina gjølliga útgreining av føroysku fólkaskúlalógini, síðan lógin kom í gildi, her undir eina nýmeting av kostnaðinum, skrivar arbeiðsbólkurin í álitinum.

Mett var í 1997, tá ið Fólkaskúlalógin varð samtykt, at tað skuldu góðar 88 mió. til at innføra lógina og fáa hana at virka. Komandi ár eru tað settar 185 mió. av til fólkaskúlan.

**Viðgerast**

Sum vanligt er við tílík høvi, so søgdu tey bæði, sum tóku ímóti eisini nøkur orð. Bæði tóktust fegin um avrikið hjá arbeiðsbólkinum. Elsa Birgitta Petersen, forkvinna í Føroya lærarafelag, segði seg hava saknað hetta í longri tíð, og hetta fór at gera tað lættari hjá teimum at arbeiða við teirri so nógv umtalaðu fólkaskúlalógini.

Eisini landsstýrismaðurin í skúlamálum, Óli Holm, hevði góð orð at bera arbeiðsbólkinum og álitinum, hóast hann ikki hevði fingið stundir til heilt at lesa hetta ígjøgnum enn. Hann segði, at hetta fyrst verður viðgjørt á fólkaskúladeildini hjá mentamálastýrinum. Hann dugir ikki at siga, um hetta verður latið til viðgerðar í tinginum, áðrenn val verður.

# B6 á tingi

**Millum munnligu fyrispurningarnar í tinginum mikudagin vóru eisini tveir, sum viðvíktu støðuna á B6**

B6
*Heri á Rógvi*



*Finnur Helmsdal heldur Sámal Petur í Grund vera kvalifiseraðan til eitt misálit*



*Kristan Magnussen vildi fegin hava Løgtingið at viðgera spurningin um sjúkrasystrarnar á B6.*

Kreppukenda støðan á B6 hevur verið nógv at hoyrt og sæð til hesar seinastu vikurnar. Málið snýr seg í stuttum um, at 18 sjúkrasystrar mestsum í einum hava sagt seg úr starvi. Hesar vóru so ónøgdar við umstøðurnar á deildini, at tær sóu ongan annan møguleikan uttan at siga seg úr starvi.

Sjúkrahúsleiðslan hinvegin metir, at arbeiðsstøðurnar eru nøktandi fyri deildina. Sjúkrahúsleiðslan er til reiðar at veita starvsfólkunum betri arbeiðstól, men heldur tað ikki vera neyðugt við fleiri starvsfólkum, soleiðis sum kravið hjá sjúkrasystrunum hevur ljóðað.

Partarnir hava ikki flutt seg nakað merkisvert nærri at hvørjum øðrum, og nú er málið so komið fyri hægsta lógarmyndugleika í Føroyum, Løgtingið.

**Fyrispurningur**

Støðan á B6 var í veruleikanum reist í tveimum umførum í tinginum mikudagin. Tann fyrsti, sum spurdi um støðuna var Kristian Magnussen, tingmaður fyri Javnaðarflokkin. Hann spurdi Sámal Petur í Grund, landsstýrismann í almanna- og heilsumálum, um starvsviðurskiftini á B6.

Í svari sínum segði Sámal Petur í Grund m.a., at arbeitt verður við málinum. Hann nevndi eisini, at málið skal gjøgnum nakrar prosessir, og hetta eiga vit at minnast til, soleiðis at vit ikki loypa nakra prosess um.

Kristian Magnussen segði eisini, at tað átti sagt landsstýrismanninum okkurt, tá ið 18 sjúkrasystrar siga seg úr starvi.

Sámal Petur í Grund ásannaði, at tað var talan um eitt neyðarróp. Hann segði samstundis, at tað verður arbeitt við einari loysn.

Kristian Magnussen segði dagin eftir, at hann ikki metti svarið frá landsstýrismanninum vera nøktandi. Tá hann varð spurdur, hvat hann og hansara flokkur kunna hugsast at gera í hesum málinum, svarar hann:

– Tað er í roynd og veru ikki nógv, sum vit kunnu gera sum andstøðuflokkur. Vit kunnu bert vísa á, hvussu støðan er, sigur Kristian Magnussen.

**Misálit**

Finnur Helmsdal bar eisini fram ein munnligan fyrispurning mikudagin. Hann spurdi um markið millum fyrisitingarligar og politiskar avgerðir. Munnligi fyrispurningurin varð stílaður til løgmann, men snúði seg í roynd og veru um Sámal Petur í Grund.

Finnur Helmsdal setti spurnartekin við, um tað er ílagi, at Sámal Petur ger sum hann ger í sambandi við sjúkrasystrarnar á B6.

– Hugburðurin er blóð skeivur. Her er talan um ein rættiliga arrogantan holdning frá landsstýrismanninum. Hann er kvalifiseraður til eitt misálit, segði Finnur Helmsdal í tinginum mikudagin.

Tjóðveldistingmaðurin vildi hava løgmann at koma við ábreiðslum til Sámal Petur í Grund.

Løgmaður svaraði spurninginum við at siga, at tann politiska avgerðin í hesum sambandi var at játta pening. Um tað skuldi vera soleiðis, at løgmaður skuldi taka um endan í øllum tílíkum málum, so hevði hetta enda við reinum kaos.

Finnur Helmsdal segði seinni, at hann ikki ætlar at gera álvara av tonkunum um at reisa misálit.

B6:

## Semingsuppskot latið til leiðsluna

**Sjúkrasystrarnar á B6 vilja nú gera eina seinastu roynd at fáa í rættlag viðurskiftini á B6. Talan er um eitt semingsuppskot. Fleiri hendur standa enn ovast á listanum**

B6
*Heri á Rógvi*

Í skrivi til leiðsluna á landssjúkrahúsinum, verður eitt uppskot gjørt um semju. Átjan sjúkrasystrar hava skrivað undir skrivið, t.e. sjúkrasystrarnar, sum hava sagt seg úr starvi. Skrivið verður kallað fyri eitt semingsuppskot og er soljóðandi:

Undirritaðu sjúkrasystrar á B6 vilja gera eina seinastu roynd at fáa rættlag á viðurskiftini á B6.

1. 1,8 sjúkrasystrar.
2. Neyva stýring av sjúklingatalinum.
3. Sjálvstýrið aftur á deildini
4. Um sjúklingatalið fer yvir 18 og ella tyngdin verður yvir 4 røktarsjúklingar og undir sjúku – kunna innkalla tímalønt.
5. Tá aðrar deildir hava stongt, planleggja við 4 kvøldvaktum, t.v.s. eina meir enn sum nú er.
6. At neyðug arbeiðsamboð/tól sambært listanum frá 14.8.01 verða útvegað og at tól verða hildin við líka
7. Endurskoða støðuna um 3-6 mðr.

Hetta halda vit kundi verið við til at bøtt mundandi um umstøðurnar, og sjálvsagt vilja vit verða við til at menna deildina framyvir.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Jóanis Erik Køtlum.